**Fundarfrágreiðing frá lestrarráðsfundi 30.05.17**

**Á fundi:**
Erika Anne Hayfield, adjunktur forkvinna
Turid Christophersen, lesandi næstforkvinna
Jens Christian S. Justinussen, útbúgvingarleiðari
Bárður Larsen, útbúgvingarleiðari (sjúkur)
Ingi Jacobsen, lesandi
Emil Hermansen, lesandi (ikki møttur)
Anna Tórgarð (próvbókin)
Sigrid Joensen, skrivari

1. **Uppfylging frá seinasta fundi:** Enska umsóknarblaðið er lagt út á heimasíðuna. Námsskipanin masterlæra, Turid vendir aftur um ymiskt í Námsskipanini. Erika heitir á Gest og Firouz, at seta seg í samb. við Turid og Ásu til ein kjak um Námsskipanina.

**Eftirmeting av felags eftirmetingarfundinum:** Avgerð tikin um, at hava eftirmetingarfundir 2 ferðir um árið, við uppfylging, sum er sera týðandi. Øll vóru nøgd við leistin. Lesandi vóru áhugaði, høvdu nógvar viðmerkingar á fundinum.

2. **Dátueftirlitið:** Treytin fyri at fáa loyvi frá Dátaeftirlitinum er at Setrið er ábyrgdari av einum lesandi. Taka hetta upp við hini lestrarráðini, fyrisitingarstjóran, og rektaran hvussu vit finna eina loysn.

3. **Próvbókin:** Anna Tórgarð kunnaði um, hvussu hon ynskir at vit avgreiða góðskrivingar. Vísandi til hjálagda skjal. Skal eitt valfak góðskrivast skulu vit stovna eitt skeiðsnr. Viðmerkja í kunningini til lesandi um niðurstøðu av viðgerð av umsókn um góðskriving, at góðskrivingin ikki er eitt próvtal men “staðið” á próvnum.

4. **Val av lestrarráð:** Broyta viðtøkurnar, fund við fyrisitingarstjóran tá hann byrjar í starvinum. Raðfesta eftirmeting av lestrarráðnum. Turið skotið upp, at allir árgangir hava varaumboð. Leggjast fyri fyrisitingarstjóran. Hava fund við fyrisitingarstjóran um val av lestrarráð. Erika setur seg í samb. við hini lestrarráðini.

**Ymiskt:**